GJALDSTOVAN

## Teldutilboð til Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Uttanríkis- og vinnumálaráðið (UVMR) skal skifta meginpartin av teirra telduútbúna, og skal KT Landsins tí teirra vegna biða um tilboð uppá fylgjandi:

- 20 stk. Surface Pro 4.
- 20 stk. Dokking støðir til Surface PRO .
- 20 stk. Cover/tastatur til Surface PRO 4.

Krøv til telduútbúnaðin:
Prosessor: I5
RAM: 8GB
Harddisk: 256GB

Tað skal vera 3 ára garanti uppá teldurnar.

Veitarin skal vera góðkendur av framleiðaranum, antin sjálvur ella ígjøgnum triðjapart, til at gera umvælingar av telduútbúnaðinum í Føroyum. Annars lúka vanlig krøv, sum Landsnet setir til útbúnaðin, tá ið telduútboð eru. Sjá fyrr hildin útboð hjá KT Landsins...

Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keypara. Niðurstøðan um, hvat av tilboðunum – um nakað – tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi.
Onnur viðurskifti, sum verða tikin við í sammetingini:

- Leveringstíð til teldurnar eru hjá keypara
- Um garanti ikki er eins fyri allar lutirnar ynskist hetta útgreinað
- Hvat er vanlig umvælingar tíð fyri garanti umvælingar

Tilboðið skal stílast til:

KT Landsins T-postur: ktskivan@gjaldstovan.fo

Øll, sum hava latið tilboð inn, fáa svar um niðurstøðuna. Keypari metir seg kunna geva svar, um tikið verður av tilboðnum ella ikki, umleið 1 viku, eftir at tilboðsfreistin er farin.

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ávís viðurskifti ynskjast greinað nærri.

GJALDSTOVAN

Slíkir spurningar skulu so vítt møguligt verða settir fram og annars viðgjørdir skrivliga við tí fyri eyga lættari at kunna skjalprógva samskiftið.

Spurningar av slíkum slag skulu stílast til:

Høgni Rúnason Øster
hogni.runason.oster@gjaldstovan.fo

Tlf: 352492
Fartlf.: 211231

Við hesum verður takkað fyri áhugan og verður sæð fram til at hoyra aftur frá tykkum.

Vinaliga heilsan

Gjaldstovan
KT Landsins